FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Føroya Landsstýri
Tinganes
Postrúm 64
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 05.10.2023
J. nr. (MEGD): 201-4-2023

Mótmælisskriv

1. Lógaruppskot send til Løgtingið uttan hoyring

Lógarskipanin kann samanberast við eitt symfoniorkestur, sum í samljóði spælir vakrar tónar fyri áhoyrarunum. Dygdin á einstøku ljóðførunum og tónleikarunum, sum heild, byggir í stóran mun á afturmeldingar frá fakfólki og áhoyrarum. Til samanberingar hava lógarhoyringar hjá fakfólki og brúkarum grundleggjandi týdning fyri dygd og góðsku á lógarskipanini, og fyri hvussu vit mennast fólkaræðiliga og sum samfelag. MEGD vil á hesum grundarlagi mótmæla, at viðkomandi partar, harundir 24 limafeløgini og MEGD, í seinastuni ikki hava fingið høvið at viðmerkja fleiri lógaruppskot.

Talan er um fylgilógir til uppskotið til figgjarlógaruppskot fyr 2024:

- LM-022/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.
- LM-023/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.
- LM-025/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)
- LM-028/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul.

Hoyringsrætturin, sum í hesum føri er settur viks, er greitt staðfestur bæði í innlendis regluverki og í altjóða sáttmála, sum løgtingið hevur bundið seg til.

2. Rundskrivið um lógarsmíð

Hoyringarrætturin er ein grundleggingjandi partur av lógarfyrireikandi arbeiðinum, og sum landsins myndugleikar eisini hava bundið seg sjálvar til við rundskrivi um lógarsmíð frá Løgmansskrivstovuni frá 2019, sum m.a. staðfestir (1.1.10):

(...) Uppskot verða send beinleiðis til øll tey, sum stjórnarráðið veit verða ávirkað av uppskotinum. Eisini skulu øll uppskot leggjast alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, har øll hava møguleika at koma við sínum ummæli. Ummælisfreistin eigur ikki at vera styttri enn 4 vikur.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Verður uppskotið sent til ummælis samstundis sum frítíð er, eitt nú summarfrí, jólafrí og páskafrí, eigur ummælisfreistin at leingjast samsvarandi.

Rundskrivið um lógarsmíð hevur eisini krøv um, at lógaruppskot skulu upplýsa hvørjir millumtjóða sáttmálar eru á økinum, ið Føroyar hava skyldu at fylgja, og sum m.a. staðfestir hetta:

Greitt skal verða frá, um bindingar til millumtjóðasáttmála gera, at uppskotið fær figgjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna. (1.2.2.7)

Tað eigur at verða upplýst, hvussu uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið, og hvussu og í hvønn mun Føroyar við lógaruppskotinum halda og menna krøvini, sum eru ásett í millumtjóðasáttmála. (1.2.2.8)

Í fleiri av fleiri av omanfyrinevndu lógaruppskotum eru viðurskifti, sum beinleiðis viðvíkja rættindum, sum eru staðfest í altjóða altjóða brekrættindasáttmálanumum, og sum mugu metast at vera í ósamsvari við hendan sáttmála, m.a. rætturin til hoyring og ráðførslu, sum eru umrødd niðanfyri.

Kortini staðfesta aðalráðini bert, at eingir millumtjóða sáttmálar ella tvørgangandi millumtjóða sáttmálar eru viðkomandi fyri hesi uppskot, og at tað *ikki* er í andsøgn við slíkar sáttmálar. Hvussu aðalráðini so hissini kunnu koma til hesa niðurstøðu, uttan at hava ráðført seg við tey, sum eru serkøn innan økið, og sum í høvuðsheitunum fara at vera brúkarar av hesum lógum, tá tær verða settar í gildi? Uppskotini tykjasst ikki at byggja ikki á nøktandi innlit í lívskor og rættarstøðu hjá viðkomandi samfelagsbólkum, sum longu í forvegin stríðast.

3. **Ráðføringar- og hoyringsskyldan eftir altjóða altjóða brekrættindasáttmálanumum**
Umframt innanhýsis reglur í Tingskipan og rundskrivinum um lógarsmíð, áliggur ein víðfevnd ráðføringar- og hoyringsskylda á almennum myndugleikum eftir altjóða altjóða brekrættindasáttmálanumum hjá ST, smb. grein 4 (3), sum Føroyar hava bundið seg til, og sum er heilt serligur ráðførslu- og hoyringsrættur í fólkarættinum (í danski umseting og við okkara undirstriking):
*Ved udvikling og gennemførelse af lovgivning og politikker, der tager sigte på at gennemføre denne konvention, og i andre beslutningsprocesser vedrørende forhold i relation til personer med handicap skal deltagerstaterne **indgående rådføre sig med** og **aktivt involvere** personer med handicap, herunder børn med handicap, gennem de organisationer, som repræsenterer dem.*

Grein 4 (3) er ein av grundsúlunum undir altjóða altjóða brekrættindasáttmálanumum, sum Føroyar hava bundið seg til; sum kjølfestir grundregluna um, at allar avgerðir, lógir, politikkir o.a., ið antin beinleiðis og óbeinleiðis ávirka lívið hjá fólki ið bera brek, skulu

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

takast í samráð við felagsskapirnar, sum umboða tey. Ein grundregla, sum er kend undir orðingini: «Einki um okkum, uttan okkum». Í almennu viðmerkingunum sínum nr. 7 (General statement no. 7, 2018) hevur ST-nevndin fyri altjóða brekrættindasáttmálan givið neyvar leiðreglur fyri hvussu ráðførslan og hoyringin skulu fara fram. Har framgongur greitt, at felagsskapirnir, ið umboða fólk við breki eiga at vera tiknir við í tilgongdina líka frá byrjan av:

Therefore, consultations should begin in the early stages and provide an input to the final product in all decision-making processes (par. 15), og *States parties should systematically and openly approach, consult and involve, in a meaningful and timely manner, organizations of persons with disabilities.*" (par. 22)

MEGD harmast um, at lógaruppskot verða løgd fyri løgtingið, sum ávirka viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, uttan, at vit sum umboðandi felagsskapum, eru tikin við upp á ráð yvirhøvur. Hetta er í ósamsvari við innanhýsis reglurnar um lógarsmíð hjá Løgmansskrivstovuni og sáttmálafesta ráðførslu- og hoyringsrættin hjá feløgum, ið umboða fólk við breki. Tað er rætturin at vera tikin við í lógartilgongdina – heilt frá byrjan av. Vil vilja gera vart við, at hetta er ein gamal ein afturvendandi trupulleiki, og at tað er umráðandi við hesi áminning, so at trupulleikarnir verða loystir og sleppast kann undan atfinningum frá ST-nevndini, sum hevur eftirlit við altjóða brekrættindasáttmálanumum. Felagið fer at heita á stjórnarráðini í landsstýrinum um at ansa eftir, at ráðførslu- og hoyrinsskyldan verður hildin í framtíðini. Eisini vilja vit heita á løgtinginum, um at tryggja, at lógaruppskot ikki verða tikin til viðgerðar, sum ikki halda tey grundleggjandi krøvini um hoyring og ráðførslu, sum staðfest eru í rundskrivinum um lógarsmíð og í grein 4(3) í altjóða brekrættindasáttmálanumum hjá ST. Vit vilja samstundis leggja dent á, at tað nú hevur uppaftur størri týdning, at løgtingið bjóðar avvarandi feløgum til hoyringar, tá ið omanfyrinevndu uppskot koma í tingnevndirnar.

Tóra við Keldu

Forkvinna

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo